# FRÁGREIÐING

um luttøku Føroya í sjeyndu rammuskránni og
Horizon 2020 og tilmæli um framtíðar kósina



# Frágreiðing

um luttøku Føroya í sjeyndu rammuskránni og Horizon 2020
og tilmæli um framtíðar kósina verður við hesum latin
Jenisi av Rana, landsstýrimanni í granskingarmálum.

Tórshavn, tann 3. november 2020


| | |
|---|---|
| Annika Sølvará | Maria Húsgarð |
| Stjóri | Horizon 2020 samskipari |



ISBN 978-99918-3-681-2

Frágreiðing um luttøku Føroya í sjeyndu rammuskránni
og Horizon 2020 og tilmæli um framtíðar kósina

Permumynd: Støðir hjá INTERACT verkætlanini

Granskingarráðið
Bryggjubakki 12
100 Tórshavn
Tel. 567800
www.gransking.fo
November 2020

# Innihald


Innihald ... 3

Samandráttur ... 5

Summary ... 6

Frágreiðing um luttøkuna í ES-samstarvinum ... 7

Lýsing av granskingarsamstarvinum frá byrjan til nú ... 7

- Upptøka í Framework Programme 7 ... 7
- Føroyar við í Horizon 2020 ... 8
- NCP skipanin (National Contact Point) ... 9
- EURAXESS - kunningartænasta ... 10
- Granskingarráðið og Vinnuframi stuðla umsóknarskriving ... 11

Møguleikar og avbjóðingar í granskingarsamstarvinum, fyrimunir og vansar ... 12

- Møguleikar ... 12
  - Evropa sum pallur ... 12
  - Umsóknartilgongdin ... 14
  - Starvsfólkamenning og tiltrekkja arbeiðsmegi ... 15
  - Fíggjarligar umstøður ... 15
  - Fígging til nýhugsandi fyritøkur við trygd frá InnovFin í Horizon 2020 ... 17
- Avbjóðingar ... 18
  - Mál, lóggáva og smáir stovnar ... 18
  - Tíðarkrevjandi ... 18
  - Fastlæst fokus ... 19
  - Kappingin og gáttin ... 19
  - Eygleiðingar hjá NCP tænastuni ... 20
- Kostnaður og nytta av luttøku ... 22
  - Stórt virði fyri Føroyar ... 22
  - Kostnaður fyri luttøku og afturbering ... 23

Framtíðarútlit og viðkomandi málsetningar ... 26

- Horizon Forum kann seta kós ... 26
  - Økta úrtøku ... 26
  - Økt tal av umsóknum ... 27
  - Mál fyri afturbering ... 27
  - Sjónligari Føroyar ... 28

Tilmæli til framtíðarkós ... 29
Frá FP7 til Horizon Europe 2021-2027 ... 29
Rammusáttmáli fyri fleiri skráir ... 29
Aðrar skráir ... 30
Yvirlit – stuðlaðar verkætlanir og netverk ... 31
Verkætlanir ... 31
NCP Netverk ... 31

# Samandráttur

Horizon 2020 endar við árslok og ein nýggj avtala um atlimaskap skal gerast. Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin í granskingarmálum biðið Granskingarráðið um frágreiðing um luttøkuna í ES-samstarvinum. Í áheitanini verður biðið um, at samstarvið verður lýst frá byrjan til nú, at greitt verður frá fyrimunum og vansum, umframt at mett verður um framtíðarútlit og framtíðarkós. Frágreiðingin er gjørd í samstarvi við granskingarstovnar og nakrar fyritøkur.

Lýsingin av samstarvinum frá byrjan til nú byggir á avtalurnar við ES-kommissjónina og samskifti við myndugleikar, stovnar og fyritøkur. Politiskar røður, tíðindi og annað viðkomandi samskifti er eisini tikið við. Greitt verður frá skipanini við National Contact Points og uppgávunum, sum fylgja við atlimaskapinum. Samstarvið við Vinnuframa um arbeiðsuppgávur, harundir stuðulsskipan til tey, sum skriva Horizon 2020 umsóknir, er lýst.

Fakta um játtanir, umsóknir o.a. eru úr almennu Horizon 2020 skipanini. Luttøkan higartil verður lýst yvirskipað og við ítøkiligum dømum. Víst verður á, at Evropa er ein altjóða pallur, sum hevur stóran týdning fyri gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Granskingarstovnarnir menna seg og granskarar fáa avbjóðingar og uppgávur í altjóða høpi, sum ikki kundu verið avrikaðar uttan altjóða samstarv. Fyritøkur og stovnar fáa fíggjarligt rásarúm við stuðlinum. Nýggj altjóða samstørv hava eisini latið upp fyri innlendis tvørgangandi samstørvum millum stovnar og fyritøkur. Eisini hevur føroyskur banki við støði í samstarvinum gjørt avtalu við evropeiska íløgugrunnin um veðhald fyri váðafúsum lánum til føroyskar vinnukundar.

Avbjóðingar eru við at gagnnýta samstarvsavtaluna til fulnar. Hóast nógvar og sera góðar umsóknir eru sendar til Horizon 2020 og fleiri enn 10 umsóknir enn bíða eftir svari, so verður staðfest, at fíggjarliga afturberingin ikki er nøktandi. Føroyar hava rindað meira enn mett fyri luttøkuna seinnu árini, orsakað av einum sera stórum vøkstri í BTÚ. Hetta hevur økt um munin millum gjald og afturbering.

Tað fæst nógv annað enn fíggjarligur stuðul burturúr at luttaka í evropeiskum samstarvi og í altjóða netverkum. Tí verður mett, at luttøkan hevur væl størri virðið enn tað, sum verður gjørt upp sum beinleiðis stuðul til verkætlanir. Staðfestast kann, at uttan luttøkuna høvdu føroyskir granskarar ikki havt tær royndir og viðurkenning, og Føroyar ikki tað umdømi, sum vit hava nú.

Royndirnar higartil eru góðar at byggja á. Gongdin í 2020 er góð við einum øktum tali av umsóknum á fleiri nýggjum økjum. Nýggja verkætlanarskrivstovan hjá Fróðskaparsetrinum ger tað møguligt hjá Setrinum at vera miðsavnandi og stuðlað undir samstørv um gransking, menning og nýskapan á og í samstarvi við Setrið.

Mælt verður til at halda fram í Horizon Europe. Framtíðarkósin má verða meira málrættað og Føroyar eiga at seta ítøkilig mál fyri at økja um úrtøkuna. Mælt verður til, at ein almennur myndugleiki, t.d. Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan fær sum uppgávu at seta málini, at fylgja við og fylgja upp. Stovnsleiðslurnar eiga at ganga á odda til tess at skapa umstøður og samstørv.

# Summary

The Horizon 2020 period closes at the end of the year and a new Association Agreement is being prepared. As part of the preparations, the Minister for Research has requested a report on the participation in the EU cooperation. In the request, the Research Council has been asked to describe the cooperation from the beginning until now, highlight advantages and obstacles, and assess future prospects and course. This report has been written in cooperation with research institutions and some private companies.

The description of the EU-Faroese cooperation from the beginning until now is based on the agreements and the formal communication between authorities, institutions, and some private companies. In addition, speeches, news, and other relevant communication is included to highlight the course. The National Contact Point system and its requirements and obligations are explained, as well as the support system for those who write proposals to Horizon 2020.

Information and facts about grants, applications etc. are taken from the official Horizon 2020 dashboard. The participation is elucidated overall and by showing examples. The attention is on Europe as an international platform, which has major impact on research, development, and innovation in the Faroe Islands. Research institutions build up capacity and the researchers are challenged and have tasks internationally, that would not have been abled without this international cooperation. Companies and institutes have more financial freedom because of the EU grants. New international networks initiate national, cross-sectoral cooperation between public institutions and private companies in the Faroes. In addition, a Faroese bank and the European Investment Fund have made an agreement on guarantees for loans to innovative business costumers in the Faroe Islands.

There are challenges in making the most of the Association Agreement. Even if many very good proposals have been submitted to Horizon 2020 the financial return is not sufficient yet. Because of a high growth in GDP, the Faroe Islands have paid more for the participation in the last few years than was expected. This has increased the gap between the amount paid and the return amount.

Good results, other than financial results, come from the active participation in international networks. The value of the participation is therefor much higher than the financial settlement of the projects. Without the participation the Faroese researchers would not have the experience or recognition, nor would the Faroe Islands have the good reputation it has now.

The experience so far is a good baseline for further cooperation. In 2020 the amount of proposals submitted has increased in several new areas. The new project-office established at the University of the Faroe Islands is making it possible for the University to take on a centralised and supportive role for cooperation in research, development, and innovation at and in cooperation with the University.

The advice is to continue in Horizon Europe. The future course must however be more determined, and the Faroe Islands should set goals in order to increase the outcome. A public body e.g. the Board for Research, Development, and Innovation should be in charge and set goals and follow-up on the participation. The management at the public institutions have to take the lead to secure conditions and international networks.

## Frágreiðing um luttøkuna í ES-samstarvinum

Landsstýrismaðurin hevur í áheitan 9. mars 2020 biðið um at fáa eina frágreiðing um ES-granskingar- og menningarsamstarvið, nú 10 ár eru liðin síðan Føroyar formliga gjørdust partur av hesum. Víst verður á, at fyri framman eru fyrireikingar til politiska støðutakan um luttøku í komandi granskingar- og menningarskránni Horizon Europe.

Frágreiðingin eigur eitt nú at:
- lýsa granskingarsamstarvið frá byrjan til nú
- meta um møguleikar og avbjóðingar í granskingarsamstarvinum, fyrimunir og vansar
- meta um framtíðarútlit og viðkomandi málsetningar
- geva tilmæli til framtíðarkós, serliga í mun til at fáa javnvág millum kostnað og úrtøku.

## Lýsing av granskingarsamstarvinum frá byrjan til nú

Nakrir føroyskir stovnar og fyritøkur hava luttikið í ES-granskingarsamstarvinum síðani áðrenn aldarskiftið. Orsakað av, at Føroyar ikki vóru formligur partur av samstarvinum, vóru avmarkingar í møguleikunum. Stórt ynski var um, at Føroyar skuldu fáa fullan limaskap á jøvnum føti við onnur lond.

### Upptøka í Framework Programme 7

Tað var 5. desember 2007, at Jóannes Eidesgaard, løgmaður hitti ES ráðharran fyri gransking, Janez Potoènik, á fundi í Brússel. Atlimaskapur í sjeyndu rammuskránni (FP7) hjá ES var á dagsskrá og fekk løgmaður váttan fyri, at Føroyar kundu verða partur í FP7. Løgmaður vísti á týdningin, sum mett varð, at atlimaskapurin hevði fyri granskingarumhvørvið í Føroyum, og legði dent á, hvussu umráðandi tað er, at smáu londini eisini eiga lut í granskingarskráunum hjá ES. Landið eigur at verða mett í mun til førleika og granskingarúrslit. ES ráðharrin segði, at luttøkan hjá Føroyum í FP7 hevði ikki verið løtt at taka støðu til, men at hann var nøgdur við gongdina og útlitini fyri føroyskum atlimaskapi.

Tað tók tíð at koma á mál, og var tí ikki fyrr enn í 2010, at atlimaskapurin varð veruleiki. Í mai 2010 varð kunngjørt, at Føroyar vóru partur í sjeyndu rammuskránni hjá ES.



Avtalan var samtykt í Løgtinginum 12. mai 2010. Hon fekk virknað við afturvirkandi kraft frá 1. januar 2010 til 31. desember 2013.

Hetta var tað, sum granskingarumhvørvið í Føroyum hevði ynskt í fleiri ár. Fleiri granskingarstovnar høvdu longu tá luttikið í ES verkætlanum, og ynski var um at økja hesa luttøku. Í februar 2012 kundi Granskingarráðið boða frá, at føroyskar fyritøkur og stovnar høvdu fingið sera góð úrslit, tá ið umsóknir, ið

vóru latnar inn til ES skipanina í november, vóru mettar. Fíggjarligi parturin til føroysku luttakararnar varð mettur at vera umleið € 861.000 fyri fimm verkætlanirnar, svarandi til umleið kr. 6,4 mió.

Hvør rammuskrá er sjey ár. Føroyar komu við í FP7 mitt í skeiðinum, so tað gekk bert stutt tíð til, at støða skuldi takast til, um Føroyar skuldu halda fram í næsta skeiðinum.

## Føroyar við í Horizon 2020

Í apríl 2013 varð almannakunngjørt, at landsstýrið hevði gjørt av, at Føroyar framhaldandi skuldu taka lut í ES-granskingarsamstarvinum. Við hesum var óvissan um framtíðar luttøkuna ruddað av vegnum.

Ivi hevði verið bæði um eina løgfrøðiliga forðing í uppskotinum til reglugerð fyri Horizon 2020, og um tað loysti seg nóg væl at vera við. Løgfrøðiliga forðingin snúði seg um, at Føroyar als ikki vóru nevndar í uppskotinum til nýggja skipan, sum tí varð broytt, soleiðis at tað eisini fevndi um Føroyar. Spurningurin um tað loysti seg at vera við, snúði seg mest um, hvørt vit fáa líka nógv játtað aftur, sum vit rinda í limagjaldi fyri at vera við. Royndirnar síðani 2010 vístu, at Føroyar høvdu staðið seg sera væl, eisini lutfalsliga í mun til onnur atknýtt lond. Bæði ES og onnur atknýtt lond vístu frammanundan á, at tað tekur tíð at kenna alla skipanina og sleppa framat í røttu netverkunum.

Úrslitini í 2013 vístu, at granskarar í Føroyum vóru komnir munandi skjótari við, enn nakar hevði roknað við. Fyrstu tvey árini fingu vit, sum væntað, ikki líka nógv aftur, sum vit rindaðu, men í 2012 fingu vit meira enn tað, vit rindaðu. Útlitini fyri 2013 vóru eisini góð. Afturat øllum hesum skal leggjast alt tað, sum ikki kann gerast upp í pengum, m.a. atgongd til tøkni, tól, netverk og servitan.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í mentamálum, úttalaði, at tað hevur alstóran týdning at vera við í ES-granskingarsamstarvinum. Vit eiga at vera við í arbeiðinum at finna loysnir á stóru avbjóðingunum, sum øll lond í Evropa hava. Spurningar um heilsu, varandi orku, burðardygga tilfeingisumsiting, matvørðuframleiðslu og veðurlagsbroytingar, sum standa ovast á breddanum í Horizon 2020, eru eisini viðkomandi í Føroyum. Gransking og innovatión eru millum amboðini, sum kunnu hjálpa okkum at finna loysnir á hesum spurningum og vera við at skapa vøkstur og arbeiðspláss, segði Bjørn Kalsø.

Hóast landsstýrið gjørdi av at halda fram við samstarvinum, so var ikki givið, at Føroyar vóru atlimaðar í Horizon 2020, tí neyðugt var við formligum samráðingum við ES um málið. Á sumri 2013 var fundur á embætismannastigi millum ES og Føroyar um verandi avtalu og um framhaldandi samstarv. Ein endalig avtala skuldi harumframt formliga góðkennast í Føroyum og í Evropasamveldinum. Roknað var við, at hetta var klárt at gera tíðliga í 2014 og upplýst var, at meðan samráðingarnar vóru, kundu Føroyar luttaka í Horizon 2020 eins og í FP7.

Í juni 2014 varð almannakunngjørt, at ein avtala á embætisstigi var klár at senda til viðgerðar í ES skipanini, áðrenn hon kundi undirskrivast av pørtunum. Avtalan ásetti, at atlimaskapurin var afturvirkandi frá 1. januar 2014.




Tað var tó ikki fyrr enn í desember 2014, at kunngjørt varð, at løgmaður, Kaj Leo Holm Johannesen, umboð fyri italska formansskapin í ES, Marco Peronaci, og ráðharrin fyri gransking og innovation, Carlos Moedas, høvdu undirskrivað avtaluna, sum tryggjaði Føroyum atlimaskap í Horizon 2020.

Seinkingin kom í orsakað av politiskum stigum, ið ES samtykti ímóti m.a. útflutningi úr Føroyum, og hóast tað ikki fekk nógva umrøðu í almenna rúminum, hevði støðan ávirkan á samráðingarnar um nýggja avtalu um atlimaskap.

Í røðu sínari segði løgmaður, at Føroyar koma við góðum vísindagrundvølli við greiðum styrkjum á ávísum økjum vísandi til okkara oyggjasamfelag, sum byggir á úrtøku úr havinum. Víst var á stórar møguleikar í aling, burðardyggari orkuframleiðslu og tekniskari útgerð til skip. Harumframt vóru Føroyar lýstar sum eitt royndarøki fyri størri verkætlanir á øllum økjum, eisini t.d. heilsugransking og samfelagsvísindi.

## NCP skipanin (National Contact Point)

Atlimaskapur í FP7 og seinni Horizon 2020 hevði við sær, at ein National Contact Point tænasta varð sett á stovn og NCP umboð tilnevnd. Hetta er krav til øll luttøkulondini.

Granskingarráðið hevur frá byrjan havt høvuðsábyrgd av NCP tænastuni, sum hevur sum mál at umboða Føroyar mótvegis ES, fylgja við í og kunna um møguleikar, umframt at hjálpa granskarum og fyritøkum at brúka skipanina.

Granskingarráðið setti í 2007, eftir áheitan frá Mentamálaráðnum, tvey fólk til at menna og røkja NCP tænastuna. Hetta varð seinni broytt soleiðis, at ein NCP var í fulltíðarstarvi í Granskingarráðnum og fýra granskarar vóru settir í 10% starv sum parttíðar NCP.




Tá ið Horizon 2020 fór av bakkastokki gjørdist greitt, at alt størri dentur var á innovatión í smáum og miðalstórum fyritøkum, og at uppgávan hevði verið betri loyst í tættari samstarvi við vinnuøkið. Eftir samskifti við Vinnumálaráðið var semja um, at samskiparin í Vinnuframa skuldi átaka sær uppgávu sum NCP, sum part av starvinum har, og at Vinnumálaráðið bar tann lønarkostnaðin.

Í 2016 var skipanin við parttíðar NCP umboðum steðgað, tí mett var ikki, at nóg mikið kom burturúr. Í staðin tók stjórin í Granskingarráðnum fleiri uppgávur á seg, soleiðis at tað í dag eru trý tilnevnd NCP umboð, eitt í Vinnuframa og tvey í Granskingarráðnum. Mentamálaráðið hevur, sum yvirskipaður

myndugleiki eisini leiklut í NCP tænastuni m.a. við at tryggja, at NCP tænastan virkar í samsvari við reglur, sum ES-kommissjónin hevur ásett.

Umframt NCP uppgávuna røkja umboðini eisini arbeiðið í Programme Committees, sum eru nevndirnar hjá ES-kommissjónini, sum fyrireika innihaldið í Horizon skráunum. Talan er um nevndir, har serfrøðingar innan ávís fakøki og evni kjakast og viðgera innihaldið í útboðunum, sum eftirfylgjandi koma NCP tænastuni til hoyringar, áðrenn tey verða lýst alment. Úr Føroyum hava fakfólk luttikið á fundunum saman við NCP umboðnum, men sum oftast eru tað einans NCP umboð ella umboð fyri Sendistovuna í Brússel, sum møta á fundunum.




NCP tænastan skipar fyri kunningarfundum, skeiðum í umsóknarskriving og kunnar um møguleikarnar í Horizon 2020.

Gjøgnum árini hava útlendskir serfrøðingar og umboð fyri ES -kommissjónina vitjað í Føroyum og skipað hevur verið fyri ymsum kveikjandi tiltøkum og fundum.

## EURAXESS - kunningartænasta

Sum part av ES-samstarvinum gjørdu Granskingarráðið  og Mentamálaráðið av at søkja um stuðul at byggja upp eina EURAXESS tænastu í Føroyum.

EURAXESS er ein kunningartænasta, sum hevur til endamáls at gera tað lættari hjá granskarum at flyta millum lond. EURAXESS hevur tænastudeplar í 42 londum, sum veita kunning og vegleiðing til granskarar, sum flyta millum londini.

Føroyar fingu í 2012 játtaðar umleið 900.000 kr. frá ES til at seta á stovn føroyska EURAXESS tænastu. Játtanin var galdandi frá 1. januar 2013 til 31. desember 2014. Ein samskipari varð settur í tvey ára parttíðarstarv at gera føroyska EURAXESS portalin og vera við til at byggja upp føroysku EURAXESS tænastuna.

Føroyski EURAXESS portalurin – euraxess.fo – varð latin upp 19. desember 2014. Portalurin hevur hópin av praktiskum upplýsingum til útlendskar granskarar og gevur føroyskum granskingarstovnum møguleika at lýsa størv leys ókeypis. Ein nýggjur portalur kom í 2017, sum er meira samvirkandi við europeiska EURAXESS portalin.

Eftir at játtanin frá ES er liðug, hevur Granskingarráðið í samráð við Mentamálaráðið rikið skipanina víðari. Føroyska EURAXESS tænastan er sambært leiðreglum frá ES skipað við yvirskipaðum ábyrgdarhavara (Bridgehead Organisation) í Granskingarráðnum, tænastudeplum (Service Centres) og kontaktfólkum (Contact Points) á flestøllum granskingarstovnum.

Granskingarráðið hevur umframt at menna og dagføra EURAXESS portalin eisini givið út handbók og faldarar við praktiskum upplýsingum til granskarar og granskingarstovnar. Harumframt hevur Granskingarráðið skipað fyri kunningarátøkum og skeiðum fyri kontaktfólk á granskingarstovnum og útlendskum granskarum. Eisini hava fundir verið við myndugleikar um ymsar forðingar hjá útlendskum granskarum, ið vilja virka í Føroyum. Starvsfólk í Granskingarráðnum hava somuleiðis luttikið á netverksfundum ymsastaðni um EURAXESS og verið við í verkætlanum saman við EURAXESS tænastum í øðrum londum.




Ein týðandi partur av EURAXESS er Charter & Code ásetingarnar hjá ES um setanar- og starvsviðurskifti á granskingarstovnum. Stovnar, ið lúka krøvini, fáa viðurkenning, sum veitir starvsumsøkjarum trygd fyri, at starvsviðurskifti eru í samsvari við ES-ásetingar. Eisini er tað ein fyrimunur og kann skjótt gerast eitt krav fyri at fáa fígging frá ES, at stovnar hava sett í gildi Charter & Code ásetingar. Fýra føroyskir granskingarstovnar hava fráboðað, at teir taka undir við Charter & Code. Eingin hevur tó enn sett ásetingarnar í gildi, sum krevst fyri at fáa viðurkenning.

## Granskingarráðið og Vinnuframi stuðla umsóknarskriving

Fyri best at gagnnýta avtaluna við ES um luttøku Føroya í samstarvinum og fyri at lætta um hjá stovnum og virkjum í sambandi við umsóknararbeiðið, hevur Granskingarnevndin gjørt av at játta pening úr Granskingargrunninum at lata teimum, sum arbeiða ítøkiliga við umsóknum. Endamálið er at minka nakað um fíggjarligu íløgurnar hjá stovnunum.

Í 2010 avgjørdi Granskingarnevndin á fyrsta sinni at seta 200.000 kr. av til at hjálpa stovnum og fyritøkum fíggjarliga, sum arbeiða við FP7 umsóknum. Henda skipan helt áfram í Horizon 2020. Stovnur ella virki kann fáa upp til kr. 35.000 endurgoldnar fyri útreiðslur, sum standast av arbeiðinum við einari umsókn. Stuðulin verður játtaður eftir umsókn so leingi játtan er tøk.

Nevndin í Vinnuframa hevur eisini tikið ímóti umsóknum og játtað stuðul til føroyskar fyritøkur, sum senda umsókn til Horizon 2020. Talan er serliga um umsóknir til SME Instrument, sum er ætlað smáum og miðalstórum fyritøkum. Sjey føroyskar fyritøkur hava fingið stuðul úr SME Instrument og í nøkrum førum hevur Vinnuframi rindað part av kostnaðinum til at skriva hesar umsóknirnar.

Stuðul til at skriva umsóknir er íkomin við íblástri uttanfyri Føroyar. Av tí at umsóknirnar eru ymiskar, hava stuðulsskipanirnar í ávikavist Granskingarráðnum og Vinnuframa ymisk krøv og treytir fyri at fáa stuðul. Tað eru nøkur umsóknarsløg, sum ikki hava verið fevnd av skipanini, t.d. hevur ikki verið latin stuðul til at skriva umsókn til Marie S. Curie Actions, Individual Fellowship, sum er flytføriskráin, tí her er talan um ein granskara, sum søkir saman við einum stovni. Hinvegin, hevur Granskingarráðið fleiri ferðir havt skeið í umsóknarskriving, har hesar umsóknir hava verið venjingargrundarlag. Tað verður mett alneyðugt at stuðla tilgongdini, tí krøvini eru nógv og m.a. málburðurin í umsóknunum skal vera av slíkum slag, sum fangar tey, sum skulu lesa og meta um umsóknirnar.

# Møguleikar og avbjóðingar í granskingarsamstarvinum, fyrimunir og vansar

## Møguleikar

### *Evropa sum pallur*

ES-samstarvið er ein pallur at vísa úrslit úr Føroyum. Tað er til dømis við til at styrkja Havstovuna sum ein altjóða granskingarstovn, og er við til at seta Føroyar og okkara stóra og ríka havøki á heimskortið. Fiskaaling hevur umvegis játtan og luttøku í stórari verkætlan fingið altjóða viðurkenning og tey kunnu brúka hetta, tá tey samskifta og samstarva við aðrar granskingarfyritøkur, serliga útlendskar.

Nógv gransking kann ikki gerast lokalt, einsamalt, men krevur altjóða samstarv. Við avtaluni við ES um samstarv hava stovnar, fyritøkur og einstaklingar møguleika og atgongd til luttøku í evropeiskum verkætlanum á jøvnum føti við samstarvsfelagar í Evropa. Hetta ger nakað við umhvørvið í Føroyum og leiklutin, sum Føroyar hava í altjóða høpi. M.a. er Memorandum of Understanding undirskrivað millum Fróðskaparsetrið og universitet uttanlands eftir samstarv um umsókn til Horizon 2020. MoU verður undirskrivað, tá ið stovnar binda seg til varandi samstarv.

Fyri Sjókovan, sum er ein nýggjur, privatur, ikki-vinnuligur granskingarstovnur við royndum við ES verkætlanum, gevur samstarvið møguleikar at luttaka í slóðbrótandi gransking í altjóða høpi og góðar møguleikar at samstarva tvørturum landamørk. Tað sama er galdandi fyri Havstovuna, sum eisini vísir á, at nógva samstarvið í sambandi við skriving av umsóknum styrkir millumtjóða netverk og at varandi altjóða samstørv spyrjast burturúr luttøkuni. Eisini verður víst á, at altjóða samstarv hevur økt vitanina hjá stovnunum um granskingarøkini hjá teimum og at luttøkan styrkir um vitanina um viðkomandi viðurskifti her í Føroyum.

Havstovan luttekur í verkætlan við heitinum Blue-Action. Tó at henda verkætlan var planløgd, áðrenn heimsmálini hjá Sameindu Tjóða vóru samtykt, so hevur ES-kommissjónin sett heimsmálini upp í móti úrtøkuni frá verkætlanini. Her sæst, at Blue-Action verkætlanin viðger trý heimsmál.




At Føroyar eru við til at loysa alheims avbjóðingar og at tað verður sýnt fram á evropeiska pallinum, hevur ómetandi virði.

Á heimasíðuni hjá Havstovuni stendur um Blue-Action, at endamálið er: “At menna førleikarnar at lýsa, modellera og framsiga veðurlagsbroytingar í Arktis og teirra ávirkan á veðurlag og veður á norðaru hálvu, íroknað ógvusligt veður, eins og at veita gagnliga veðurlagstænastu til samfelagsligan ágóða”. At náa hesum máli er fokus sett á bæði hav og luft, og hvussu hesi ávirka veðurlagið í Arktis. Somuleiðis skal kannast, hvussu veðurlagið í Arktis ávirkar veðrið í t.d. Evropa. Hetta verður ikki gjørt av einum landi einsamalt. Føroyar luttaka við síni servitan og langtíðarmátingum av rákinum fram við Føroyum.

Arktis er á breddanum hjá Evropa og alsamt fleiri verkætlanir snúgva seg um hendan partin av jarðarknøttinum. Tann nýggjasta verkætlanin er ArcticHubs, sum Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum komandi fýra árini luttekur í. Endamálið við ArcticHubs er at eyðmerkja, kortleggja og kanna, hvørja ávirkan altjóða kappingin um at troyta náttúrutilfeingi í Arktis hevur á fólk og lokalsamfeløg í økinum.




Endamálið við Horizon 2020 hevur serliga verið at byggja brýr millum vinnu og vísindi. Ein føroysk fyritøka, sum hevur royndir við ES samstarvi er Tøkni. Fyritøkan hevur fingið sambond við stovnar uttanlands og hevur tað givið nýggjar ráðgevingarkundar uttanlands.

Í verkætlanin REEEM mennir Tøkni eina røð av datavisualiseringsamboðum fyri orkuskipanargreiningar á Danmarks Tekniske Universitet (DTU). Við amboðunum ber til at síggja langtíðarárinini av ymiskum orkupolitikkum.

Umframt ítøkiliga úrslitið úr REEEM verkætlanini, er Tøkni við í norðurlendskum granskingarverkætlanum og fær fyrispurningar um at vera við í øðrum Horizon verkætlanum.

Ein onnur fyritøka er Ocean Rainforest, sum fæst við taraaling. Við verkætlanini Macro Cascade tryggjaði Ocean Rainforest føroyska luttøku í stóra samtakinum Bio Based Industries, Joint Undertaking. BBI JU er samtak millum Horizon 2020 og Bio Based vinnuna í Evropa.



Ocean Rainforest sær góðar møguleikar at arbeiða við gransking og menning í altjóða høpi og at fáa útlendska fígging til Føroya, sum kann skapa nýggjar vinnuligar møguleikar her heima.

Á yvirlitinum yvir føroyskar verkætlanir sæst MRCC, sum luttekur í samstarvi um trygd og kreppufyrireiking í Arktis og Norðuratlantshavi. Verkætlanin ARCSAR hevur stóran týdning fyri Føroyar og MRCC, sum við hesum altjóða netverki hevur fingið fleiri kontaktpersónar í bjargingarhøpi og samstarv við fólk við servitan innan ymisk øki.




Fleiri vísa á luttøku í øðrum viðkomandi altjóða arbeiðsbólkum, innbjóðing til ráðstevnur og annað avleitt virksemi, sum Horizon 2020 verkætlanin hevur lagt lunnar undir. Hesir møguleikar, sum til dømis at skapa sær eitt týðandi professionelt altjóða netverk, kunnu ikki mátast og síggjast heldur ikki aftur í hagtølunum. Givið er, at evropeiski pallurin og føroyska luttøkan í Horizon 2020 eigur sín leiklut.

### *Umsóknartilgongdin*

Granskarar, sum hava roynt seg, vísa á, at tað er ein skapandi tilgongd at skriva umsóknir, og at hetta loyvir granskarum at útgreina hugskot, sum kunnu verða áhugaverd, gagnlig og ómakin verd at nýta tíð og orku uppá. Tilgongdin leggur upp til hugarok og samstarv um loysnir millum tey, sum luttaka í bólkinum.

Arbeiðið við umsóknunum kann ofta brúkast aftur í øðrum høpi, eisini í teimum førum, har stuðul ikki fekst. M.a. vísir Ocean Rainforest á, at umsóknir, sum ikki verða játtaðar, verða oftani broyttar nakað og latnar inn aftur seinni í øðrum útboðum.

Hóast ábending er um, at umsóknin í sær sjálvum krevur somikið nógv, at hon forðar fyri luttøku, so meta tey flestu, at góð sannlíkindi eru fyri at fáa verkætlanir upp at koyra í øðrum høpi.

## *Starvsfólkamenning og tiltrekkja arbeiðsmegi*

Møguleikin at luttaka í ES verkætlanum hevur avgerandi týdning fyri at menna granskararnar til altjóða gransking og at arbeiða í toymum. Slíkar avbjóðingar bæði menna og motivera tann einstaka. Harumframt verður grundvøllurin lagdur fyri spennandi arbeiðsplássum til fólk við hægri útbúgvingum, og vitanartung størv verða á fleiri fakøkjum. Tí hevur luttøkan atdráttarmegi í mun til at fáa framsøkin og dugnalig starvsfólk; og tað kann vera altavgerandi fyri førleikamenningina hjá starvsfólkunum.

Horizon fíggingin er grundarlagið undir virkseminum hjá eitt nú Sjókovanum og serútbúna starvsfólkahópinum har. Uttan altjóða luttøkuna, hevði ikki verið møguligt at sett fólk við hesum útbúgvingunum í starv.

Tær fakligu avbjóðingarnar og tað altjóða samstarvið, sum tær ES-fíggjaðu verkætlanirnar hava við sær, gera Havstovuna til eitt meira spennandi og avbjóðandi arbeiðspláss, enn hon annars hevði verið. Hetta er ikki einans galdandi fyri tey, sum eru beinleiðis tengd at teimum einstøku verkætlanunum, men ávirkar stovnin sum heild.

Altjóða granskingarsamstarvið og tann vitanin sum fæst burturúr, hevur eina synergieffekt á allan stovnin. Starvsfólk sleppa at royna seg á ókendum økjum og í flestu førum er neyðugt at hugsa uttanfyri boksina, og leita sær nýggja vitan í samband við verkætlanararbeiði. Hetta gevur starvsfólki møguleika at luttaka á fundum uttanlands og hitta fólki úti í heimi. Hetta er við til at styrkja samanhaldið millum starvsfólkini og eisini samstarvsevnini hjá tí einstaka.

Gott samstarv út í heim ger, at vit í Føroyum eru lokkandi hjá útlendskum starvsfólki ella føroyingum uttanlands, sum ynskja at koma heim. Arbeiðsplássini verða spennandi og serstøk, serliga tá ið føroyska íkastið eisini er ger mun úti í heimi. Møguleiki verður at samstarva við tey bestu í Evropa og at draga altjóða vitan til sín.

## *Fíggjarligar umstøður*

Luttøkan í ES verkætlanum hevur avgerandi týdning fyri summar stovnar og fyritøkur, eisini fíggjarliga. Fíggingin kann verða við til at broyta umstøðurnar hjá einari fyritøku, so at rúm verður fyri at skapa nýggjar vinnuligar møguleikar.

Verður hugt eftir skránni fyri smáar og miðalstórar fyritøkur – SME Instrument – so hevur endamálið verið at gera smáar fyritøkur stórar. At skapa møguleika at koma á altjóða marknaðin við framleiðslu ella nýggjari vitan. Her er talan um beinleiðis fíggjarligt íkast til marknaðarkanning og at fyrireika nýggju framleiðsluna til marknaðin. Skipanin hevur ein fasu II møguleika fyri fyritøkur, sum eru komnar longri.



Sjey smáar føroyskar fyritøkur hava fingið játtað stuðul úr SME Instrument, fasu I. ES-kommissjónin hevur havt umboð í Føroyum í sambandi við eftirlit og eftirmeting av skipanini. Tær fyritøkurnar, sum høvdu hesi umboð á vitjan, lótu væl at og søgdu, at umboðið úr ES rósti avrikunum, sum vóru væl fyrireikað við greiðum málum viðvíkjandi úrtøkuni.




Umframt at luttaka sum einstøk fyritøka, kann fyritøka eisini verða partur av størri netverki ella konsortium og arbeiða við ítøkiligari verkætlan. Víst verður á, at ES-fíggingin kann verða við til at skapa fíggjarligt grundarlag fyri eina fyritøku, sum leggur seg eftir at arbeiða við menning og gransking. Tó kann henda fígging ongantíð gerast meira enn 50-60% av samlaða inntøkugrundarlagnum.

At luttaka í Horizon 2020 verkætlanum gevur fyritøkuni møguleikan at seta serkøn starvsfólk til ávísa uppgávu í verkætlanini. Víst verður á, at hetta hevði ikki verið ein møguleiki uttan fíggingina, sum er beinleiðis til lønarkostnað.




Í almennum stovnum sæst luttøkan aftur við tað, at tað fíggjarliga gerst møguligt at gera arbeiði, sum annars ikki hevði verið gjørt. Hetta er ikki einans galdandi fyri lønina, men eisini í mun til tað avrik ella virksemi, sum skal frá hondini. Stovnurin verður størri og arbeiðir breiðari enn stovnurin annars hevði kunnað.

Munurin millum almennan stovn og privata fyritøku er eyðsýndur í fíggjarliga partinum av verkætlanini. Ein fyritøka fær ikki fullan stuðul, tí fyritøkan virkar við vinningi fyri eyga. Tí má ein fyritøka leggja seg eftir at luttaka í verkætlanum, sum hava beinleiðis týdning fyri fyritøkuna og tess virksemi. Hinvegin kann og eigur ein almennur stovnur og kanska serliga Fróðskaparsetrið at síggja nýggjar møguleikar við eksternari fígging, sum til dømis úr Horizon 2020.

### *Fígging til nýhugsandi fyritøkur við trygd frá InnovFin í Horizon 2020*

InnovFin SME Guarantee Facility er eitt veðhald, sum evropeiski íløgugrunnurin, European Investment Fund (EIF), veitir útvaldum bankum og kundum teirra. Endamálið við InnovFin er at stimbra lánveitan til smærri og miðalstórar fyritøkur í Evropa og londum, sum taka lut í Horizon 2020.

BankNordik gjørdi í 2019 avtalu við EIF, ið gav bankanum møguleika at veita nýhugsandi fyritøkum í Føroyum lán við lagaligum treytum. EIF veitir bankanum veðhald við fíggjarligum styrki úr ES fyri lán, sum lúka ávísar treytir fyri nýhugsan. Er t.d. stuðul latin fyritøkuni fyri minni enn trimum árum síðani, antin úr Horizon 2020 ella føroyskari stuðulsskipan, so lýkur fyritøkan viðkomandi treyt hjá EIF fyri lánsveitan.




BankNordik upplýsir, at samstarvið við EIF hevur eydnast væl. Upprunaliga avtalan var um játtan fyri 300 mió. kr., sum í 2020 er hækkað við 150 mió. kr. til í alt 450 mió. kr. Avtalan loyvir BankNordik at veita vinnukundum nýggj lán við kappingarførum treytum, har InnovFin veðheldur fyri 50% av lánsupphæddini, ið verður latin.

Hetta minkar um váðan hjá bankanum, og ger tað møguligt at veita fleiri lán enn áður, samstundis sum lánini kunnu veitast við lagaligari treytum.

At EIF átekur sær helvtina av váðanum, og InnovFin-lán harvið 'vekta' minni fyri bankan, hevur eisini týdning fyri kapitalstýringina hjá bankanum, tí kapitalkrøvini verða alsamt herd.

Tað er BankNordik, sum viðger lánsumsóknir og tryggjar, at fyritøkur verða kreditmettar og at lántakarar lúka ásettu treytirnar í InnovFin. Einir tíggju føroyskir kundar hava fingið hetta slagið av láni.

InnovFin gongur út við árslok saman við Horizon 2020. Avtalur eru tó galdandi í 2 ár frá tí, at tær eru undirskrivaðar, og sostatt er avtalan við EIF galdandi til juli 2022 ella til játtanin er brúkt.



## Avbjóðingar

### *Mál, lóggáva og smáir stovnar*

Fleiri avbjóðingar eru, sum bæði smáar fyritøkur og størri almennir stovnar dragast við. Ein avbjóðing er málið. Enskt er ikki vanliga arbeiðsmálið á øllum økjum og als ikki í smáum fyritøkum. Málið kann gera tað trupult at seta saman umsókn og eftirfylgjandi at greiða frá úrslitum, sum spurdust burturúr luttøkuni.

Ein onnur avbjóðing er lóggávan. Hetta sæst serliga væl á heilsuøkinum. Ílegusavnið varðar av gransking í mannaílegum, sum eru viðkvom dáta. Dátuverndarlógin setir høg krøv í sambandi við gransking av viðkvomum dátum og tað kann vera ein avbjóðing at samstarva um landamørk.

Nógvir granskingarstovnar eru smáir og hava lítlar og ongar royndir við luttøku í evropeiskum verkætlanum. Tað hevur víst seg, at summir av smáu stovnunum ikki síggja seg førar fyri at hava fleiri ella nógvar verkætlanir í gongd í senn.

Ein granskingarstovnur, sum er rímiliga stórur og viðkomandi í Føroyum, kann hava avbjóðingar at fóta sær í altjóða samstarvi, og er Tjóðsavnið dømi um hetta. Tjóðsavnið hevur sambært teimum sjálvum ikki luttikið í nakrari ES-granskingarverkætlan hesi árini, tó at tey meta, at tað er bæði neyðugt og kveikjandi at hava altjóða samstørv. Trupulleikin er avmarkaða arbeiðsorkan á stovninum, har bert eitt starvsfólk arbeiðir á hvørjum øki og tað ger, at stovnurin ongan møguleika hevur at brúka orku uppá umsóknir.

Búnaðarstovan hevur heldur ikki notið luttøku í Horizon 2020 verkætlanum, men hóast tað, halda tey tað vera av stórum týdningi, at føroyskir stovnar hava møguleikan fyri at samstarva við evropeiskar granskingarstovnar og samstarvsfelagar um evni av felags og altjóða áhuga. Landbúnaður og matframleiðsla eru júst evni av altjóða týdningi.

MRCC, sum luttekur í Horizon 2020 verkætlan um trygd í Arktis, sigur hinvegin, at sum lítil stovnur í hesum risa samstarvi, kann tað vera krevjandi til tíðir at umsita partin hjá MRCC, serliga í byrjanini. Men áhugin drívur verkið og MRCC hevur hildið teirra avtalur higartil og vænta at halda áfram við tí.

Tey, sum hava drúgvast royndir í ES samstarvinum meta ikki, at tað eru beinleiðis vansar við luttøkuni, annað enn at tað krevur nógva orku at fáa umsóknirnar skrivaðar. Víst verður á, at hetta ger tó at verkætlanirnar eru væl gjøgnumhugsaðar, og betri av tí sama.

### *Tíðarkrevjandi*

Hóast alt eftirhondini er talgilt og sum so smidligt, so eru tað fleiri luttakarar, sum halda, at skrivstovuputlið er ov nógv. Tað krevur nógva tíð og orku at søkja.

Stovnar vísa á, at tíðin og arbeiðsorkan til umsitingarligt arbeiði kann ofta tykjast møtimikil – serliga tá umsóknir, sum mann hevur brúkt nógva tíð og orku uppá, ikki verða játtaðar. Eisini granskarar vísa á tíðarkrevjandi arbeiðið við umsóknum sum ein bága, serliga tí tað kann ganga yvir aðrar arbeiðsuppgávur.

Tíðin, frá umsóknin verður send inn og til svar um stuðul er móttikið, er stytt munandi seinastu árini. Eisini er ES-kommissjónin vorðin alsamt betur at kunna um, nær svar kann væntast. Treyðugt so, er hetta ikki altíð nóg mikið hjá t.d. einari fyritøku at planleggja eftir.

Tíðin, sum er brúkt til eina umsókn, sum ikki fær játtað stuðul, er lutvíst farin til spillis, heldur onkur, tó at flestu luttakarar í Horizon 2020 verkætlanum eru ósamd í hesum. Serliga tí at umsóknin kann nýtast í øðrum høpi ella tillagast og sendast inn av nýggjum.

### *Fastlæst fokus*

Fyri eina fyritøku kunnu vansarnir við at luttaka í størri verkætlanum vera m.a., at fokus í fleiri ár verður bundið at nøkrum, sum møguliga vísir seg ikki at vera rætta leiðin fyri fyritøkuna. Hendir tað, verður orka brúkt uppá at menna eitthvørt, sjálvt um áhugin og vinnumøguleikarnir hjá fyritøkuni liggja aðrastaðni. Verður orkan nýtt á henda hátt og stuðul einans er til beinleiðis útreiðslur, so er ikki rúm fyri yvirskoti, sum er neyðugt hjá einari fyritøku.

Fyri granskaran verður evnið treytað av ytri kreftum og vísindaligi spurningurin kann enda við ikki at vera líka viðkomandi, sum hann upprunaliga var. Harvið kann vísindaliga uppgávan verða avmarkað og ávirkað bæði í tíð og evni.

### *Kappingin og gáttin*

Kappingin er hørð og útlitini fyri at fáa stuðul eru á nógvum økjum avmarkaði og tí ógjørlig at planleggja við. Gáttin at koma í sterk konsortium er oftast høg, men høga gáttin er ikki bara ein vansi, tí hon økir eisini um kappingarføri, við tað at bert tey bestu fáa fígging.

Fyri granskingarstovnarnar er talan ofta um at koma við í konsortium ella samstarv við útlendskar granskarar. Nøkur av hesum konsortium hava virkað í fleiri ár, hava fingið játtað stuðul og roynt seg saman um verkætlanir. Tí kann tað verða trupult at koma við sum nýggjur partur.




Umsóknarskrivingin er krevjandi hjá óroyndum luttakarum og tað kann vera hørð innanhýsis kapping í konsortiinum í umsóknartilgongdini.

Sum lítil partnari í einum stórum konsortium, er tí altavgerandi, at leiðslan er góð til at kunna og inndraga allar partar.

Gáttin kann, ofta saman við miseydnaðum royndum serliga í fyrstani, gera at summir granskarar gevast við royndunum at søkja. Serliga er tað galdandi fyri tey, ið royna fleiri ferðir og fáa noktandi svar.

## *Eygleiðingar hjá NCP tænastuni*

NCP tænastan í Granskingarráðnum hevur samband við stovnar og fyritøkur. NCP umboð svara spurningum, greiða ivamál og veita hjálp í sambandi við skráseting í ES skipanini. Tað er einki fast mark fyri uppgávunum, annað enn at øll fáa eins góða tænastu. Kunningarfundir og skeið verða hildin eftir tørvi.

Í fleiri førum hevur verið møguligt hjá NCP umboði at luttikið virkið í umsóknarskriving og samskifti í sambandi við umsókn. Umsóknartilgongdin gevur innlit í, hvussu stórt og umfatandi arbeiði er, serliga tá ið fleiri altjóða partar luttaka. Mentanir møtast, málið er ein avbjóðing fyri summi og arbeiðsmentanin er ymisk frá landi til land. Tað merkist, at stovnar uttanlands hava sett sum mál at senda umsóknir til Horizon 2020 og at tey hava stuðul frá baklandinum í tilgongdini.

Stovnarnir í Føroyum eru ymiskir á støðd og í virksemi. T.d. er Landssjúkrahúsið ein granskingarstovnur, sum fakliga saktans kundi luttikið í ES verkætlanum, men fleiri viðurskifti gera, at sjúkrahúsið ikki luttekur, m.a. raðfesting av sjúkuviðgerð. Á kunningarfundi á Landssjúkrahúsinum vóru møguleikarnir í Horizon 2020 umrøddir og víst var á Havstovuna sum dømi um føroyskan stovn, sum klárar seg væl. Ein viðmerking frá fundarfólki var ein samanbering við skúlaskipanina; um vit ímynda okkum, at Havstovan er á miðnámsstigi, so er Landssjúkrahúsið í løtuni á barnagarðsstigi í mun til gransking. Tað er ein nokkso beinrakin samanbering, tí stórur munur er á stovnunum.

Hóast ein Horizon 2020 verkætlan rindar fyri arbeiðið og enntá eigur at síggjast aftur í vøkstri og nýggjum virksemi á stovninum, uttan mun til um talan er um post.doc. við stuðli úr flytførisskipanini, Marie S. Curie Actions ella luttøku í stórum altjóða netverki, so merkist afturhaldni á fleiri granskingarstovnum. Ofta verður víst til, at stovnurin ikki megnar fleiri verkætlanir ella at fólk ikki er til uppgávuna. Tað er nógv sum bendir á, at tey eru fá, sum velja at royna at senda inn og so síggja, um tað ikki gongur allíkavæl, - og kanska okkurt nýtt og mennandi kemur burturúr.

Tað er givið, at leiðslan má vera framsøkin, skapa umstøður og eggja og loyva starvsfólkunum at taka slíka uppgávu á seg. Ein ES verkætlan tekur nógva tíð og krevur ágrýtin starvsfólk, sum vilja uppgávuna og sum síggja uppgávuna sum ein mennandi part av sínum starvi.

Granskingarráðið hevur viðgjørt spurningin um innanhýsis viðurskifti og raðfestingar á fundum, har leiðslurnar á stovnunum hava verið savnaðar. Á heysti 2019 var eitt Horizon Forum sett á stovn, har viðkomandi fólk, tvs. tey, sum hava royndir við at søkja ella sum hava ábyrgdina fyri evropeisku verkætlanunum á stovninum, hava umrøtt støðuna og mett um, hvussu Føroyar best fara inn í framtíðina.

Víst hevur verið á, at Horizon 2020 alsamt økir krøvini fyri at fáa stuðul. Umsóknirnar skulu innihalda eina røð av upplýsingum, sum ikki altíð eru við hondina. Frá Granskingarráðsins síðu hava vit gjørt vart við, at Føroyar áttu at havt strategi ella dagsskrá, sum er egnað og ætlað til umsøkjarar at nýta og vísa til í umsóknini. Sum ikki ES limaland, er ikki krav um t.d. Smart Specialisation Strategy, sum ES lond skulu hava, og møguliga er tað heldur ikki tað, sum vit skulu leggja okkum eftir.

Givið er tó, at lond, sum hava málsetning, strategi og/ella eina dagsskrá fyri gransking, menning og nýskapan og av luttøkuni í Horizon, hava betri amboð, enn tey sum Føroyar kunnu bjóða sínum umsøkjarum.




Umsóknirnar skulu skrivast á ein hátt, har sum orðaval og tilvísingar til aktuellar dagsskráir skulu verða av slíkum slagi, sum metingarfólk og skrivstovur í Brússel vænta. Hetta krevur nógv av umsøkjaranum, og verður bíðað við at søkja, so verða krøvini og gáttin enn hægri.

Tað krevur royndir at søkja. Um føroyskir stovnar ikki søkja, so verður afturberingin har eftir. Fyri hvørja ferð søkt verður, fáast royndir, fleiri samstarvspartar og afturmeldingar frá skipanini, sum geva møguleika at styrkja umsóknir til næstu ferð. Tí hevur dentur verið lagdur á at kunna um, at tað skulu sannlíkt skrivast og sendast fleiri umsóknir inn, áðrenn tað eydnast fyrstu ferð at fáa stuðul játtaðan og arbeiðið við skipanini fer at tykjast lættari.

Mett verður, at í Føroyum eru góðir møguleikar fyri altjóða verkætlanum. Fólkini eru vælútbúgvin og landafrøðiliga liggja vit væl fyri, tá ið hugsað verður um gransking í havi, veðurlagi, heilsu, nýggjum orkuloysnum ella Arktis, sum øll eru evni, sett á breddan í Evropa. Serfrøðin í Føroyum innan alivinnu og fiskivinnu borgar fyri góðsku í matframleiðslu til altjóða marknaðir, umframt at granskingarførleikar innan biotøkni eru mentir munandi seinnu árini.

Á hesum yvirlitinum síggjast teir stovnar og fyritøkur, sum higartil hava fingið stuðul úr Horizon 2020:

**Number of project participations and Net EU Contribution/EU Contribution**

| Legal Name | Country | H2020 EU Contribution | H2020 Net EU Contribution | H2020 Participations |
|---|---|---|---|---|
| **Totaux** | | **€ 4.226.518** | **€ 4.380.393** | **30** |
| SP/F SYNTESA | Faroe Islands | € 931.561 | € 1.065.436 | 4 |
| SPF OCEAN RAINFOREST | Faroe Islands | € 724.340 | € 724.340 | 3 |
| HAVSTOVAN | Faroe Islands | € 651.249 | € 651.249 | 5 |
| JARDFEINGI | Faroe Islands | € 459.105 | € 459.105 | 3 |
| SPF TOKNI | Faroe Islands | € 239.200 | € 239.200 | 1 |
| SJOKOVIN | Faroe Islands | € 228.122 | € 228.122 | 1 |
| SP/F DECISION3 | Faroe Islands | € 222.151 | € 222.151 | 1 |
| FRODSKAPARSETUR FOROYA | Faroe Islands | € 158.375 | € 158.375 | 1 |
| PF FISKAALING | Faroe Islands | € 151.790 | € 151.790 | 1 |
| MRCC TORSHAVN | Faroe Islands | € 72.875 | € 72.875 | 1 |
| THE FAROESE RESEARCH COUNCIL (GRANSKINGARRADID) | Faroe Islands | € 37.750 | € 57.750 | 2 |
| CHRISTIANSEN SUNI | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SP/F DELIVER | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SP/F GREENARC | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SP/F KPT | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SPF BLUE OCEAN | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SPF FRAMA | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |
| SPF LOGPH | Faroe Islands | € 50.000 | € 50.000 | 1 |

## Kostnaður og nytta av luttøku

### *Stórt virði fyri Føroyar*

Hóast Føroyar samanlagt ikki enn hava fingið fíggjarliga javnvág ímillum gjald og úrtøku, so hevur luttøkan í ES-samstarvinum nógv onnur virði, ið ikki kunnu gerast upp í pengum her og nú.

Altjóða samstarv er neyðugt og tað er ofta ein fyritreyt fyri, at verkætlanir kunnu gerast í Føroyum ella fyri at náa ávísum málum her heima. Hetta mugu myndugleikarnir hava frammarlaga í huganum, tá gransking og menning skal stuðlast.

Vit liggja í einum øki, har stór orka verður løgd í at ansa eftir umhvørvinum, at skjalprógva broytingar og spáa um framtíðar veðurlagsbroytingarnar. Føroyar eiga at taka sín lutfalsliga part av ábyrgdini á hesum øki.

Tað gera vit í fleiri Horizon 2020 verkætlanum, m.a. á infrakervisøkinum. Eitt dømi er verkætlanin InterAct, har Jarðfeingi var við heilt frá byrjan í 1990' árunum. Hendan verkætlan hevur til endamáls at eyðmerkja, skilja, spáa um og handla í sambandi við umfatandi umhvørvisbroytingar í arktiska økinum.

InterAct er stuðlað av ES heilt frá 5. rammuskránni í 2001. Í dag eru øll lond kring Arktis við og tað eru nærum 100 mátistøðir í økinum. Hetta sæst á myndini á forsíðuni.




Ein onnur stór verkætlan við sera nógvum luttakarum er Eurofleets+, har Havstovan luttekur saman við eini ørgrynnu av pørtum úr 25 londum.  Mynd høgrumegin.

Politiska skipanin hevur ofta víst á ynski um tættari samstarv millum gransking og vinnuna í Føroyum. Hetta er eisini nakað, sum Horizon 2020 leggur upp til. Eitt gott dømi um nýggja stóra verkætlan í Horizon høpi er at finna á aliøkinum.

Verkætlanin AquaVitae er samstarv millum 35 granskingarstovnar og vinnuna úr fleiri ymiskum londum, eisini uttanfyri Evropa. Málið er at menna aliframleiðsluna og økja virðisketuna.

Tað, sum er sermerkt við AquaVitae er, at fleiri luttakarar eru úr Føroyum, sum umboða bæði alment og privat virksemi. Fiskaaling, Ocean Rainforest og Sjókovin eru beinleiðis partar í verkætlanini, umframt at bæði Bakkafrost og Luna eru undirveitarar.

Virðini av samstarvinum í AquaVitae og tann eksponering, sum Føroyar og føroyskt virksemi fær úti í heimi, síggjast ikki beinleiðis í fíggjarligum uppgerðum, men tað eigur at verða tikið við, tá ið mett verður um luttøkuna.

Mett verður, at sum frá líður fer tann fíggjarliga javnvágin at koma og at Føroyar tí eiga at halda áfram í Horizon Europe 2021-2027.




## *Kostnaður fyri luttøku og afturbering*

Tá ið avtalan um Horizon 2020 var til viðgerðar, var í uppriti til løgmann víst á avtaluna um luttøku í FP7 við tillagingum. Hildið var skilabest, at avtaluteksturin varð broyttur sum minst, samstundis sum tryggjað varð, at broytingarnar, sum ES-kommissjónin kom við, bert vóru av yvirskipaðum tekniskum slag og ikki øðrvísi enn í samsvarandi avtalum við onnur lond.

Føroyar høvdu tó uppskot um eitt nýtt reglubrot í innleiðandi partinum av nýggju avtaluni:

> *RECOGNISING the special situation of the Faroe Islands with their small territorial size and population and close proximity to the EU as a northern European neighbour;*

Endamálið við hesum reglubroti var at hava eina tilvísing, sum viðurkendi serstøðu Føroya sum eitt lítið land og eitt av nærmastu grannalondum hjá ES. Eisini var við hesum eitt yvirskipað grundarlag í avtaluni at vísa til, um so var, at ynski var at gera brúk av ásetingini um at endurskoða gjaldsfrymilin eftir 3 árum.

> *"In the fourth year after this Agreement becomes applicable, the Parties shall review the proportionality factor governing the financial contribution of the Faroes, on the basis of the data concerning participation of Faroese legal entities in indirect and direct actions under Horizon 2020 in the years 2014-2016."*

Tað framgongur, at fundir hava verið í desember 2013 og februar 2014, har tað frá føroyskari síðu var víst á mismunin millum samlaða gjaldið frá Føroyum til FP7 og samlaðu fíggingina, ið Føroyar fingu burturúr í sama tíðarskeiði.

Ført var fram, at um støðan framvegis var soleiðis eftir trimum árum, vildi tað verið mett, at ES skipanin í sær sjálvari er ein serlig avbjóðing fyri eitt so lítið land sum Føroyar, við avmarkaðari arbeiðsorku. Føroyar ynsktu tá at fáa høvi at venda aftur til spurningin um gjaldsfrymilin og til tey serligu viðurskifti, ið gera seg galdandi fyri Føroyar.

Spurningurin um endurskoðan av gjaldsfrymlinum varð reistur á felagsnevndarfundi millum Føroyar og ES, tá skeiðið var hálvrunnið. Hóast grundgivið varð fyri, at vit tá ikki høvdu fingið nøktandi afturbering enn, so mettu umboðini frá ES ikki, at tað var orsøk til at brúka nevndu ásetingina. Tað spurdist tí einki ítøkiligt burturúr hesum.

Í sambandi við undirskriving av sáttmála um Horizon 2020 skeiðið, gjørdi ES eina meting av luttøkugjaldinum, sum er grundað á ein leist, tengdur at BTÚ hjá atknýttu londunum og ES.

Fíggjarliga uppgerðin fyri Horizon 2020 skeiðið vísir, at Føroyar hava goldið væl meira enn mett, serliga í árunum 2017-2020. Hetta skyldast stóra vøksturin í BTÚ hjá Føroyum.




Uppgerðin vísir eisini greitt, at higartil er munandi undirskot fyri Føroyar í mun til beinleiðis afturberingina gjøgnum játtaðar verkætlanir. Ein partur av orsøkini er at finna í áðurnevndu lýsing av teimum avbjóðingum og forðingum, sum stovnar og fyritøkur hava víst á.

Harafturat eru tvey viðurskifti, sum skulu havast í huga.

Í fyrra lagi, so kom órógv á umsóknararbeiðið hjá Føroyum í 2014, tí stígur kom í samráðingarnar um sáttmálan orsakað av fiskivinnuósemju. Hóast ES vissaði um, at ein avtala kundi verða gjørd við afturvirkandi kraft, so vóru fleiri lond ótrygg við at hava Føroyar við í umsóknum hetta skeiðið. Her mistu vit helst ein part av møguleikunum í 2014.

Í øðrum lagi, so er játtanarskeiðið forskotið í mun til gjalds- og umsóknarskeiðið, soleiðis at skilja, at frá tí at til bera at søkja til ein møgulig játtan verður latin og sáttmáli undirskrivaður, gongur ofta upp í næstan eitt ár. Vit vita, at tað í 2020 eru latnar fleiri umsóknir inn, enn undanfarin ár, og nógvar av hesum hava ikki fingið svar enn. Tað eru eisini nakrar umsóknarfreistir eftir, har vit vænta umsóknir úr Føroyum verða sendar inn. Tí er møguligt, at tað koma onkrar játtanir afturat, sum eru partur av 2020 skeiðinum, men har sáttmáli ikki verður undirskrivaður fyrr enn í 2021.

Í uppgerð yvir, hvat ár játtaðu umsóknirnar hoyra til, sæst hetta mynstrið, t.d. við, at tað eru tríggjar verkætlanir, sum hava fingið játtað stuðul í umførum við umsóknarfreist í 2014, men sáttmálarnir eru undirskrivaðir í 2015.

Verður stuðul játtaður til umsóknir frá hesti 2020 og vári 2021, verður sáttmáli undirskrivaður í 2021.




Tað er ikki skylda hjá føroyskum umsøkjarum at kunna Granskingarráðið um umsóknir, men vit vita tó um flestu umsóknir, sum verða latnar inn, áðrenn tær síggjast skrásettar í ES-skipanini. Skipanin verður dagførd umleið 3. hvønn mánað, so umsóknir, sum vóru sendar inn í august og september eru ikki við í yvirlitinum enn.

Higartil eru formliga skrásettar í alt 135 umsóknir, harav 114, sum vóru mettar at lúka formligu treytirnar. Samlaða talið av umsóknum er hægri, og vit vita um í minsta lagi 11 umsóknir, sum ikki hava fingið svar enn.



## Framtíðarútlit og viðkomandi málsetningar

Hvussu síggja framtíðarútlitini fyri føroysku luttøkuni út, hvat skal til fyri at standa okkum betri og hvør skal gera hvat?

Vit vita frá samráðingum um Horizon Europe luttøku, at gjaldsásetingin helst verður broytt munandi. Hetta fer at broyta gjaldsmynstrið, tí sannlíkt verður skipanin beinleiðis tengd at, hvussu føroyskir umsøkjarar standa seg í kappingini. Tað eru eisini aðrar broytingar ávegis, eitt nú fer størri dentur at vera lagdur á samfíggjaðar verkætlanir. Hetta fer at krevja eina meira miðvísa og virkna støðutakan til luttøku úr Føroyum.

### Horizon Forum kann seta kós

Granskingarráðið hevur sum nevnt sett eitt Horizon Forum á stovn. Higartil hava stovnsleiðarar og onnur fyri Horizon 2020 viðkomandi starvsfólk luttikið á fundunum í Horizon Forum. Tað hevur tó verið umrøtt, at hesin fundurin kann skipast við fólkum frá ymsum geirum, alt eftir evni og dagsskrá. Tað kundi verið fundir við luttøku frá stovnum og fyritøkum um ávíst evni, fundur við fyritøkur um ávísar stuðulsskipanir ella fundir við stovnsleiðarar um strategi.

Ein dagsskrá hjá Horizon Forum kundi verið at sett málsetningar fyri luttøkuna 2021-2027. Í øðrum londum er tað politiski myndugleikin, sum setir málini, men tað ber væl til at hugsa øðrvísi í Føroyum og taka lógvatøk saman.

### *Økta úrtøku*

Sum nevnt omanfyri eru nakrir almennir stovnar ógvuliga royndir, meðan onnur enn ikki hava eydnast við fígging úr Horizon grunninum.

Um vit vilja økja úrtøkuna fyri allar almennar stovnar, so kundi tað verið gjørt við at:

- Vit læra av royndunum hjá teimum royndu í Føroyum
- Vit nema okkum vitan frá viðkomandi stovnum uttanlands
- Vit miðsavna ráðgevingina á Fróðskaparsetrinum
- Hvør stovnur gevur lyfti um at senda eitt tal av umsóknum inn

Á Fróðskaparsetrinum er ein verkætlanarskrivstova farin til verka. Ætlanin er, at skrivstovan skal veita hjálp og stuðul til tey á Setrinum, sum ynskja at luttaka. Hetta er viðkomandi, tí tað vísir seg, at um starvsfólk ikki hava stuðul frá stovnsleiðsluni, so er lítið sannlíkt at komið verður á mál við einari umsókn.

Sum universitet hevur Fróðskaparsetrið sera viðkomandi leiklut í umsóknum, sum verða sendar úr Føroyum, og tí eigur Setrið eisini taka á seg leiklutin sum savnandi og eisini sum stigtakari til umsóknir. Eitt umsóknarslag, sum Føroyar enn ikki hava eydnast at fáa fígging úr, er sonevnda "Widening" skráin. Her er talan um samstørv millum lond, sum eru bólkað sum minni roynd lond og tey sum eru roynd lond. Føroyar eru "widening-land" og Setrið er eyðsæddur umsøkjari í hesi skrá.

Førleikin at skriva umsóknir í Føroyum eigur at mennast. Higartil eru flestu umsøkjararnir partar av størri netverkum, har onnur; ofta eitt universitet uttanlands, førir pennin. Við at taka á seg samskipandi - koordinator - leiklutin ella at verða stigtakari til umsóknina, fer meira at liggja eftir í Føroyum og fleiri føroyskir luttakarar verða við.

Tí eiga vit at tryggja:

- at leiðslan á stovninum vil luttaka
- at leiðslan eggjar og skapar umstøður fyri starvsfólkini
- at yngri granskarar eru við í arbeiðinum fyri á tann hátt at uppbyggja førleikar
- at útbúgva fólk og uppbyggja førleikar at skriva umsóknir
- at hugsa fleiri føroyskar luttakarar, eisini sum undirveitarar

### *Økt tal av umsóknum*

Fyri at eydnast í Horizon høpi skulu nógvar umsóknir sendast inn. Fólk við royndum vísa á, at tað skulu sendast umleið 10 umsóknir inn fyri hvørja umsókn, sum fær játtað stuðul.

Ein málsetningur kundi verið at ásett eitt neyvt tal av umsóknum, sum skulu latast inn úr Føroyum samlað sæð, frá royndum stovnum og frá minni royndum stovnum.

Metast má um, hvat tað talið skal vera og nær talið er nóg framsøkið.

Er tað, til dømis, tá ið:

- talið av umsóknum er tvífaldað
- so og so nógvar nýggjar umsóknir verða sendar inn ella
- tá eitt ásett tal av umsóknum um árið verða sendar inn

### *Mál fyri afturbering*

Beinleiðis afturbering er tann upphædd, sum kemur aftur til landið í játtaðum stuðli. Í Føroyum verður hugt eftir stuðli í mun til ta upphædd, sum er rindað til ES fyri at luttaka.

Mett verður, at samanberingin millum londini kann lýsast í mun til fólkatal. Fyri smá lond er eyðsæð, at hvør játtan ger mun. Ísland hevur t.d. fingið eina sera stóra verkætlan á orkuøkinum og tað sæst aftur í samlaðu afturberingini.

| Land | Tal av stuðlaðum verkætlanum | Samlaður stuðul úr Horizon 2020 í 1.000 DKK - *afturbering* | Fólkatal | Stuðul per íbúgva í DKK |
|---|---|---|---|---|
| Danmark | 2.543 | 11.392.686 | 5,825,337 | 1.956 |
| Norra | 1.708 | 9.680.060 | 5,374,807 | 1.801 |
| Malta | 159 | 240.885 | 514,564 | 468 |
| Ísland | 277 | 935.243 | 364,134 | 2.568 |
| Føroyar | 28 | 31.500 | 52,703 | 598 |

### *Sjónligari Føroyar*

Teir stovnar og tær fyritøkur, sum luttaka, vísa á, hvussu nógv annað enn bert fíggjarligt íkast kemur við luttøkuni í evropeiskum verkætlanum. Vit eiga at síggja møguleikan at vera attraktiv ella dragandi fyri dugnalig fólk. Um tey bestu virka í Føroyum, um enn bara í eitt tíðarskeið, so vil tað hava onnur avleidd jalig árin á umhvørvið.

Nógv vita um og kenna til føroyska granskingarumhvørvi og hava samstarv við føroyskar stovnar. Men treyðugt so, eiga vit at leggja størri dent á at gera Føroyar sjónligari uttanlands og greiða frá møguleikunum fyri samstarvi og virksemi á øðrum økjum.

Um vit gera eina felags lýsing, sum er ein størri mynd av møguleikunum í Føroyum og vísa á iNOVA-samstarvið, slóðbrótandi tøkni, aling, havrannsóknir og landbúnað í einum, saman við góðum útbúgvingarmøguleikum, so kann vera, at tey bestu í Evropa hava hug at koma hendan vegin at virka, um ikki annað í eitt tíðarskeið.




Myndin av øllum sambondunum hjá Føroyum í Horizon 2020 vísir, hvussu tætt knýtt vit eru við umheimin. Hvør strika umboðar luttakandi partar í eini felags verkætlan. Tess reyðari strikan er, jú fleiri sambond eru millum londini. Millum Norra og Føroyar eru 67 sambond, harnæst kemur Stórabretland við 53, Týskland 41, Frakland 40, Svøríki 38, Spania og Danmark við 35 sambondum.

Fyri hvørja verkætlan vit luttaka í og fyri hvørt fólk, sum flytur til Føroya at arbeiða við gransking og menning, knýtast týdningarmikil bond og víðkast netverk, sum vit fáa nyttu av í langa tíð fram. Talan er um langtíðaravkast, sum er trupult at gera upp fíggjarliga, men sum samlað sæð styrkir støðu Føroya í alheims samfelagnum, á granskingar- og menningarøkinum, og yvirhøvur.

# Tilmæli til framtíðarkós

## Frá FP7 til Horizon Europe 2021-2027

Áðrenn atlimaskapin í FP7 luttóku føroyskir stovnar sum triðjaland í evropeiska granskingarsamstarvinum, sum oftast sum undirveitarar.

Við atlimaskapinum “vuksu” føroysku luttakararnar, tí Føroyar vóru nú sjálvstøðugt land í granskingarsamstarvinum. Leikluturin broyttist og føroysku stovnarnir kundu undirskriva stuðulsavtaluna beinleiðis við Brússel og verða partur av stórum altjóða konsortium á jøvnum føti við onnur.



Mett verður ikki, at ein framtíðarkós er at geva upp nú ella at lata tað umdømi, sum er við at verða bygt upp, fara fyri bakka.

Mælt verður til, at føroyskir myndugleikar tryggja Føroyum atlimaskap í Horizon Europe 2021-2027.

Mælt verður til, at kósin verður sett við málsetningum viðvíkjandi ítøkiligu luttøkuni og at henda uppgáva verður løgd til serkøn fólk, formliga til nýstovnaða Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan, men eisini til Horizon Forum.

Mælt verður til, at landsstýrismaðurin samskiftir beinleiðis við stovnsleiðslurnar fyri at tryggja, at øll skilja uppgávuna, so at málið kann verða rokkið.

## Rammusáttmáli fyri fleiri skráir

Mælt verður til, at føroyskir myndugleikar miðja eftir einum rammusáttmála við Evropasamveldið um luttøku í fleiri skráum, soleiðis sum ætlanin er.

Ein rammusáttmáli eigur at verða orðaður soleiðis, at til ber at víðka sáttmálan til aðrar skráir enn Erasmus+ og Creative Europe, sum eru tær aktuellu.

Fleiri fyrispurningar eru frá føroyskum luttakarum um aðrar evropeiskar skráir. Føroyingar verða boðin við í konsortium ella finna okkurt áhugavert evni, sum hevði hóskað sum verkætlan á teirra øki.

Nakrar av hesum skráum eru einans fyri ES limalond og tí er svarið einfalt og nei, tað ber ikki til. Hinvegin eru ábendingar um, at Evropa fer at lata upp fyri atlimaskapi í onkrum av hesum og tí eiga Føroyar at liggja framvið og tryggja, at tað kann bera til at víðka sáttmálan, um ynski er um tað.

## Aðrar skráir

Fyrispurningar hava verið um aðrar skráir.

Fleiri stovnar hava spurt um Erasmus+ og danska skrivstovan, sum fyrisitur Erasmus+ skránna hevur upplýst, at tey ofta móttaka fyrispurningar um møguleikan at koma til Føroya.

Filmshúsið hevur spurt um Creative Europe.

Ein annar ES grunnur er: European Maritime and Fisheries Fund. Føroyskur stovnur hevur luttikið í verkætlan og móttikið fígging. Hetta er tó steðgað, tí Føroyar lúka ikki formligu krøvini fyri luttøku.

Onnur skrá er: LIFE - the European Programme for the Environment and Climate Action. Her er umsókn úr Føroyum send inn. Tann umsóknin fekk tó ikki játtað stuðul, so spurningurin um luttøkuna var ikki aktuellur.

Granskari á heilsuøkinum hevur spurt um The European Union's Health Programmes.

Samanumtikið hevur Evropasamveldið eina røð av møguleikum, sum eisini eru viðkomandi fyri umhvørvi og virksemi í Føroyum. Í onkrum føri ber sannlíkt til at luttaka um triðjaland við egnari fígging ella sum undirveitari. Hinvegin er ikki vist, at tað verður so kostnaðarmikið at hava ein rammusáttmála, sum fevnir um fleiri skráir, um so er at ES-kommissjónin velur at víðka luttøkuna til onnur enn ES-limalondini.

## Yvirlit – stuðlaðar verkætlanir og netverk

Fleiri stovnar og fyritøkur í Føroyum hava fingið stuðul til verkætlanir og netverk frá FP7 og Horizon 2020. Niðanfyri eru leinki til flestu av hesum verkætlanum og netverkum.

### Verkætlanir

AquaVitae - Fiskaaling, Ocean Rainforest og Sjókovin

ArcticHubs - Fróðskaparsetrið

AtlantOS - Havstovan

Blue-Action - Havstovan

EURO-BASIN - Havstovan (Liðug)

Eurofleets+ - Havstovan

JericoS3 - Havstovan

NACLIM - Havstovan (Liðug)

EDU-ARTIC - Jarðfeingi

INTERACT - Jarðfeingi

ArcSar - MRCC

MACRO Cascade - Ocean Rainforest

Clime-Fish - Syntesa

Primefish - Syntesa

REEEM - Tøkni sp/f

7 fyritøkur hava fingið stuðul úr SME Instrument fasu I.

### NCP Netverk

Access4SMEs

BioHorizon

CaRE

C-Energy 2020

COSMOS2020

ERC

EURAXESS TOPIII og TOPIV

Health NCP Net 2.0

Idealist2018

NCP Acadamy

Net4Mobiity

Net4Society

NMPTeam-3 Project

RICH

SEREN3

SIS.net

WIDE-net